

# Nógv spennandi til yngstu gestirnar

**Indiánarar, kovboyarar, bommverksmiðja, livandi djór og sjálvandi eisini hoppiborgir. Hetta er bert nakað av tí, sum stóra Silvalandið ella barnalandið á Summarfestivalinum kann bjóða sínum yngstu gestum**





**Stóra Silvalandið verður aftur karmur um tilboðini til børnini á ársins Summar festivali. Indiánarar, kovboyarar, livandi djór, andlitsmáling, flættir í hárið, hoppiborgir, góðgætisverksmiðja, spælipláss og mangt annað verður á síggja og royna í Føroya størsta barnalandi**

Sum nakað nýtt verður eitt tema í Silvalandinum í ár. Temaið er indiánarar og kovboyarar, og hesi fara at taka ímóti børnunum, tá tey vitja barnalandið.

Í ár eru tað brøðurnir Finn og Jógvan Johannessen, sum fyriskipa tiltøkini til børnini. Finn Johannessen greiðir frá, at hugskotið við at hava eitt tema er ein roynd.

- Ætlanin er at indiánararnir skuldu taka ímóti børnunum, og so skal tað eisini bera til hjá børnunum at fáa eina mynd tikna av sær og einum indiánara ella kovboy, sigur Finn.

Silvalandið liggur á grøna økinum yvir av Vágsbøi, har stóri pallur er. Tað merkir, at tað liggur í hjartanum á festivaløkinum, og tilboðini til børnini verða enn fleiri í ár.

Sum nakað nýtt verður ein bommverksmiðja, har børnini kunnu gera teirra egna góðgæti. Eisini verður andlitsmáling og tað fer eisini at bera til at fáa flættir í hárið.

Harafturat verða fleiri hoppiborgir av ymsum slagi. Onkur verður til tey heilt smáu børnini, meðan tær størru verða til tey størri børnini.

Megaborðfótbóltur er nakað nýtt, sum tey fara at royna, eins og ein klatriveggur eisini verður settur upp á økinum. Eisini ætla fyrireikararnir at gera eitt spælipláss og ein sandkassa á økinum, sum kanska serliga er ætlaður teimum smæstu børnunum.

**Framførslur**

Hóast stóri pallur verður karmur um stóra barnashowið seinnapartin leygardagin, verða børnini ikki snýtt fyri framførslur inni í sjálvum barnalandinum. Silvapallurin verður settur upp, og har koma fleiri kend at framføra fyri børnunum. Oskar kemur á vitjan, Angela og Hannibal fara eisini á pallin – eins og gyklari og eldblásarin fara at sýna fram teirra kynstur. So ongin ivi er um, at tað eru nógv tilboð til børnini á Summarfestivalinum.

- Tey flestu tilboðini í Silvalandinum eru ókeypis, men har børnini kunnu ogna sær eitthvørt, er ein rímuligur kostnaður lagdur afturat, sigur Finn Johannessen.

## Undirhald í Silvalandi

**Mikudagin 6. august**
19.00 Gyklari

**Hósdagin 7. august**
17.00 Silvalandið letur upp
18.00 Gyklari
19.00 Fimleikarar
19.30 Hoops
20.30 Oskar

**Fríggjadagin 8. august**
16.00 Silvalandið letur upp
17.00 Silvi & Gylkari
19.00 Eldblásari
21.00 Gyklari

**Leygardagin 9. august**
13.00 Silvalandið letur upp
14.00 Gylkarin
14.30 Barnashow á Stóra palli
15.00 Oskar og djórini á Stóra palli
18.00 Angela & Hannibal
19.30 Oskar